AGANEVNDIN

**KÆRA 10/2009**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá AB móti KÍ viðvíkjandi niðurflyting av** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: 05.09.2009 | Kæra innkomin til FSF: 09.09.2009 |
| Kærugjald goldið: ja | Kæran send Aganevndini: 11. 09.2009 |
| Partshoyring við 3 daga freist: Ja | Kærufreist hildin: ja |
| | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini í Aganevndini hava hesir nevndarlimir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristjansen, ráðleggingarleiðari og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

Argja Bóltfelag kærir, í telduposti tann 9. september 2009, um ólógligar leikarar á liðnum í 2. deild hjá KÍ, í dystinum AB-KÍ tann 5. september 2009. Í kæruni verður víst til grein 9 í kappingarreglunum og ført fram, at KÍ í omanfyri nevnda dysti hevði 2 leikarar á liðnum, sum ikki lúkar treytirnar í grein 9 í kappingarreglunum.

AB vísir á, at talan er um leikara nr. 9 (Oddmar á Lakjuni) og leikara nr. 6 (Rudolf Eliasen) og at hesir leikarar báðir hava leikt fleiri enn 3 dystir við 1. liðnum hjá KÍ í hesum kappingarárinum. AB vísur somuleiðis á, at hesir báðir leikarar eru í umrødda dysti fluttir frá hægri til lægri deild at spæla aftaná fjórðseinasta umfar.

KÍ vísir í telduposti tann 10. september 2009 aftur, at hava brúkt nakran ólógligan spælara í omanfyri nevnda dysti. KÍ vísir somuleiðis á, at spælarar, sum eisini spæla í hægri deild, hava ikki loyvi at flyta niður í 2. deild eftir 4. seinasta umfar í 2. deild. KÍ førir víðari fram, at sama leikdag, sum KÍ spældi í 4. seinasta umfari í 2. deild, spældu hvørki Oddmar á Lakjuni ella Rudolf Eliasen við hægri deild, og at hesir leikarar tí ikki vóru læstir frá at spæla við í 2. deildardystinum í triðseinasta umfari.

Starvsnevndin hevur ongar viðmerkingar til málið.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5 stk. 4, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 3. Fakta í málinum

Tann 5. september var dystur leiktur á Argjum millum AB og KÍ, 2. deild menn. Sambært dómaraseðlinum leiktu bæði Oddmar á Lakjuni og Rudolf Eliasen fyri KÍ hendan dyst.

Tann 30. august 2009 var dystur leiktur í 2. deild menn millum KÍ og Undri. Hetta var fjórðseinasta umfar í 2. deil, og sambært dómaraseðlinum leiktu hvørki Oddmar á Lakjuni ella Rudolf Eliasen við.

Tann 30. august 2009 var dystur leiktur í Vodafonedeildini millum KÍ og AB. Av dómaraseðlinum framgongur, at Oddmar á Lakjuni ikki stendur á dómaraseðlinum og Rudolf Eliasen sat á bonkinum uttan at sleppa inn.

FSF skrivstovan hevur upplýst fyri Aganevndini at Oddmar á Lakjuni hevur leikt fleiri enn 3 dystir við 1. liðnum hjá KÍ.

Sambært fundarfrágreiðing frá Kappingarnevndini, dagfest 26. 08.2009, fekk leikarin Oddmar á Lakjuni 2 gul kort í dystinum tann 23. august 2009 í Vodafonedeildini og fekk leikarin leikbanna í ein dag.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 9 í kappingarreglunum fyri fótbólt *"kann leikari ikki flyta frá hægri til lægri deild, eftir at fjóðrseinasti dystur er leiktur í lægri deildini"* Hetta er eisini galdandi fyri leikarar, sum koma undir grein 8, stk, 2 um leikarar eru undir 21 ár.

Sambært grein 9, 3.pkt. er *"tó loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægru deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8".*

Í grein 8 í kappingarreglunum fyri fótbólt er ásett at, *"Leikari, sum hevur luttikið í landskappingini í eini deild, kann ikki luttaka í landskappingardysti í eini lægri deild, uttan at felag hansara í millumbilinum ella sama dag, hevur leikt landskappingardyst- ella steypadyst, sum hesin ikki luttók í, í hægru deildini, hóast viðkomandi leikari lógliga kundi luttaka. Tá felag leikar í fleiri deildum, roknast hægsta deildin at hava leikt fyrst"..*

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin staðfestir, at Oddmar á Lakjuni 26. august 2009 varð leikbannaður í 1 dag eftir dyst í Vodafonedeildini 23. august.

Aganevndin staðfestir, at leikbann skal sitast av í teirri kapping og deild, tað er fingið í, sbr. grein 37, stk. 4 í kappingarreglunum.

Aganevndin staðfestir, at leikarin Oddmar á Lakjuni ikki er á dómaraseðlinum hjá KÍ tann 30. august 2009 í Vodafonedeildini, og leikarin kundi heldur ikki lógliga leika við í dystinum hendan dag, orsakað av leikbanninum.

Fyri at kunna leika fyri felag sítt í lægri deild, skal leikarin, sambært meginregluni í grein 8 stk. 1, sita dyst yvir í hægri deildini – har hann lógliga kundi leika - áðrenn leikt verður í lægri deild. Orsaka av, at landsdystur er, er eingin leikdagur í hægri deildini í døgunum 3-6 september, sum er at rokna sum ein leikdagur sbr. grein 8, stk. 7.

AGANEVNDIN

Leikarin Oddmar á Lakjuni verður tí at meta sum ólógligur leikari í dysti í 2. deild 5. september 2009 orsaka av at hann ikki hevur (fingið) yvirsitið dyst í hægri deildini innan dyst í lægri deild.

**6. Niðurstøða**

Tað er brot á grein 8 stk. 1 at gera brúk av leikarum, sum ikki hava sitið yvir dyst í hægri deild fyri at leika dyst í lægri deild.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Aganevndarreglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's.

Sambært grein 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt verður KÍ dømt at tapa dystin 0-0.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12 í Agareglugerðini kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn, 22 / 9 - 2009**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna